# ivinnuskúlanum



*Jákup Andreasen framman fyri sluppina »Havfrúgvin«, sum er ein gáva frá Mentamálaráðnum*



*Tríggjar skúlastovur eru í nýggja Fiskivinnuskúlanum, hvør við sínum floksrúmi*

eitt annað, sum hevur stóran týdning, er góða inniklimaið.

- Í verandi hølum er inniklimaið ógvuliga vánaligt. Tí er ofta neyðugt at lata vindeyguni upp, og tað eru ikki allir næminbgar, sum tola tann kuldan, ið tá blívur, sigur Jákup Andreasen.

Í nýggja skúlanum er nógv gjørt fyri at skapa eitt gott inniklima við góðari útlufting.

Eisini auditoriumið er ein søga fyri seg. Har er pláss fyri 70 næmingum, ið alir hava eitt gott útsýni yvir tað, sum fer fram á lørriftinum ella á gólvinum.

Eisini er ain væl útgjørdur køkur, men tó verður ikki talan um servering. Har gera lærarar og næmingar sjálvir kaffi og tað, sum annars er hugur til.

Flokkarnir eru sum nevnt tríggir í tali, og næmingarnir um 50 tilsamans. 20 ganga í fyrsta flokki, og 15 í øðrum og triðja flokki.

- Vit taka altíð í meira lagi inn í fyrsta flokk, tí royndir hava lært okkum, at tað altíð detta nøkur frá tá tíðin líður, sigur Jákup Andreasen.

## Góð blanding

Á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna eru 3 lærarar í føstum starvi og 18 fastir tímalærarar. Hartil koma nakrir tímalærarar aftrat til ávís fak, so tilsamans eru knýttir einir 25 tímalærarar til Fiskivinnuskúlan.

- Men tá talan er um tímalærarar, eru ongantíð so nógvir í skúlanum í senn, og tí eru hølini til lærararnar eisini nøktandi sum er, sigur Jákup Andreasen.

Millum teir 50 næmingarnar, sum ganga á skúlanum, er ein góð blanding millum gentur og dreingir. Onkur ár eru dreingirnir í meiriluta, onnur ár genturnar. Men bert einaferð er ein flokkur farin úr skúlanum sum reinur eittkyns flokkur.

- Tað var í 2007, tá vit høvdu ein reinan kvinnuflokk. Vit hava ongantíð hesi 20 árini, skúlin hevur verið til, havt ein reinan dreingjaflokk, sigur Jákup Andreasen.

Nú Fiskivinnuskúlin flytir í nýggj hølir, fara gomlu hølini at standa tóm. Landið eigur sethúsini, har Fiskivinnuskúlin hevur høvuðssæti sítt, men hóast stórur mangul er á búðplássi til næmingarnar á Fiskivinnuskúlanum, so er tað alt, ið bendir á, at húsini verða seld.

- Eingir pengar eru settir av til kollegiepláss, og uttan peningaligan stuðul frá landinum melur ein slík ætlan ikki runt, sigur Jákup Andreasen.

Men hetta er so ein annar spurningur, og fyribils gleða lærarar og næmingar seg at flyta inn í nýggju hølini komandi mánadag.




*Fløggini vóru vundin í húnar hátt longu frá morgunstundini av*



*Ein vælútgjørdur køkur hoyrir til skúlan. Men tað verður bert til lærarar og næmingar at matgera sjálvir*



*Tríggjar skúlastovur eru í nýggja Fiskivinnuskúlanum, hvør við sínum floksrúmi*



*Forhøllin er partur av stórum felagshøli*



*Ein flakalinja er eisini at finna á skúlanum, ikki so nógv til framleiðslu, men til undirvísing*



*Auditoriumið er ógvuliga snøgt og hevur pláss fyri ikki færri enn 70 næmingum*



*Rannsóknarstovan er eisini state of the art*